Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

*28. januar 2019*

# UMMÆLISSKRIV

## *viðvíkjandi*

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**at banna mismuni og tryggja javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum**

Sagt skal verða frá, at BLF tekur undir við omanfyrinevnda løgtingslógaruppskoti.

BLF vil í hesum sambandi vísa á, at Javnstøðunevndin í dag tekur støðu í málum, um møgulig brot á løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn (Javnstøðulógin). Men Javnstøðunevndin er vanliga mannað við leikfólkum. Tískil kundi tað verið skilagott, at klagunevndin, sum løgtingslóg um at banna mismuni og tryggja javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum, setir á stovn, eisini viðgjørdi møgulig brot á javnstøðulógina. So kundi Javnstøðunevndin tikið sær av tí kunnandi og upplýsandi partinum í javnstøðulógini, meðan tann løgfrøðiligi parturin bleiv viðgjørdur av klagunevndini í løgtingslóg um at banna mismuni og tryggja javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum. Tí hesar báðar lógir minni nógv um hvørja aðra.

**Vinarliga**

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya**